# Vestur um hav

**Leygardagin lata tvær føroyskar framsýningar upp í Íslandi. Onnur er "Hafsýn", sum letur upp í Hafnarborg í Hafnarfirði og hin er "Veiðimentan í útnorðri", sum letur upp í Ketilshúsinum á Akureyri. Saman við eini røð av listafólkum og stuðlum, er tað Norðurlandahúsið í Føroyum, sum stendur aftan fyri báðar framsýningarnar**



FRAMSÝNINGA
*Norðurlandahúsið*

Undir heitinum "Hafsýn" letur 11. januar 2003 upp framsýning við føroyskum listaverkum í Hafnarborg í Hafnarfirði í Íslandi.

Listafólkini eru Hanni Bjartalíð, Hansina Iversen, Astri Luihn, Anker Mortensen, Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, Hans Pauli Olsen, Eyðun av Reyni og Kári Svensson.

Annlis Bjarkhamar mentamálaráðharri setur framsýningina og nýggi leiðarin í Listasavni Føroya Jens D. Frederiksen fer at halda røðu um føroyska myndlist.

Framsýningin við føroyskari list í Hafnarborg í Íslandi verður opin allan januar mánaða.

Umframt listafólkini, eru tað Norðurlandahúsið í Føroyum og Hafnarborg í Íslandi, sum hava skipað fyri framsýningini. Norðurlandahúsið og Hafnarborg hava í fleiri ár samstarvað um skiftandi myndlistaframsýningar. Størstu einstøku stuðlarnir eru Norðurlandahúsið og Nordisk Kulturfond.

Framsýningin "Hafsýn" lat av fyrstan tíð upp í Norðurlandahúsinum 20. juni 2002 undir føroyska heitinum "Sjón í havi". Hetta var regluliga summarframsýningin. Við sama høvið lat Norðurlandahúsið prenta bók, sum á føroyskum, norskum og enskum máli lýsir tey átta listafólkini og verk teirra, sum eru við í framsýningini.

Eftir at tey átta føroysku listafólkini hava sýnt fram í Íslandi, halda tey áfram til Álands, Svøríkis og Týsklands.

## Veiðimentan í Ketilshúsi

Framsýningin "Veiðimentan í útnorðri" letur upp í Ketilshúsinum á Akureyri 11. januar 2003 .

Akureyri er staður, har gamla veiðimentanin enn sæst á havnarlagnum, eins og ferðavinnan við hepnari hond hevur nýtt henda siðarv í nútímans vinnu. Akureyri er harafturat staður, sum hevur havt sambond við Føroyar og onnur strandalond, tá umræður veiðu. Tí verður tað norski fiskimálaráðharrin Svein Ludvigsen, ið fer at lata framsýningina upp.

Ferðandi framsýningin "Veiðimentan í útnorðri" byggir á tekst hjá Jóan Paula Joensen, sum Edward Fuglø hevur sniðgivið. Framsýningin fevnir um 500 fermetrar og lýsir ta ser-staku veiðimentan, sum í øldir hevur verið tilverugrundarlagið í útnorðuri. Framsýningin byggir á fornlutir, listaverk og nútímans tøkni. Millum listaverkini teljast Mikines, Janus Kamban og Olivur við Neyst. Tríggjar stórar installatiónir hjá Edwardi Fuglø ímynda harafturat tey trý londini í útnorðri Grønland, Ísland og Føroyar.

Í sambandi við framsýningina er prentað bók, sum Birgir Kruse hevur ritstjórnað. Bókin, sum Sprotin gevur út, er á enskum og donskum. Sama bókin verður nú givin út á svenskum máli. Tað er svenska Norrøna Felagið, sum telur 27.000 limir, ið hevur fingið loyvi at nýta hesa bók sum ársbók til felagslimir í 2003.

Ferðandi framsýningin "Veiðimentan í útnorðri" lat av fyrstan tíð upp í Norðurlandahúsinum í Føroyum 15. juni 2002. Ikki færri enn 12.000 fólk vitjaðu framsýningina meðan hon var í Norðurlandahúsinum. Síðani hevur framsýningin verið í Hetlandi, Írlandi og Íslandi. Seinni fer framsýningin til Stockholm, Nuuk og St. Johns í Newfoundlandi.




Í Býin

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Vilt tú bil hýra - ring 311234
Nú fáast eisini Talutíðarkort
Føroya Tele Kall
BENZIN DIESEL KIOSK
AUTO 311234

Fríggjakvøldið
- dyrnar lata upp kl. 22
Diskotek
við DJ Kristian
Ókeypis atgongd til kl. 24
Happy Hour 23-24
Leygarkvøldið
- dyrnar lata upp kl. 22
Diskotek
við DJ Martin
Ókeypis atgongd til kl. 24
Ladies Night til kl. 01
BAROK

Manhattan PUB & CAFE
Í Vikuskiftinum
Livandi tónleikur
Manhattan
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96

Hafnia Lounge
Sunnudag - hósdag
Opið kl. 17.00-24.00
Servering steðgar kl. 23.30
Fríggjadag & leygardag
Opið kl. 17.00-01.00
Servering steðgar kl. 00.30
Hotel Hafnia
Tlf. 31 32 33
Fax 31 52 50

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið :
• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 286254

Øll hava eina góða síðu – vit hava pop.fo





Í Býin Í Býin Í Býin

HESA VIKUNA
Hóskvøldið
Øll ókeypis atgongd áðrenn kl. 22
DJ Tummas Gudmundsen
Fríggjakvøldið
Øll ókeypis atgongd áðrenn kl. 01
DJ King
Leygarkvøldið
DJ Rúni J & 80ara Eyðfinn
Alt tað besta úr nútíðini og tátíðini
Caféin í Club 20 er opin:
Hósd. 17-24, fríggjad. 17-04, leygard. 14-04, sunnud. 14-24
Discoteque er opið:
Hósd. 21-24, fríggjad. 23-04, leygard. 23-04
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjakvøldið 10. jan.
Fimmari
kl. 19 Sjavskapping
22-23 Happy Hour - Ladies Night alt kvøldið
24-04 Dansur
v/Ólavur Øster og vinmenn
UNDIRHALD
Leygarkvøldið 11. jan.
Opið frá kl. 19
22-23 Happy Hour
24-04 Dansur
v/Ólavur Øster og vinmenn
UNDIRHALD

fríggjakvøldið 10/01
Discoteque
DJ Ottar í Funningsstovu
ØLL ÓKEYPIS ATGONGD áðrenn kl. 01.00
leygarkvøldið 11/01
Discoteque
DJ Ottar í Funningsstovu
Opið frá kl. 23-04
TILBOÐ: sí www.platform.fo
PLATFORM
discoteque
sí www.platform.fo
petur & petur • 320870

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
Óli og Zakaris
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Bingo leygarkvøldið kl 20.00
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

fk Matseðilin
Hósdagin 9. jan:
Grýturættur
Fríggjadagin 10. jan:
Kalkun
Leygardagin 11. jan:
Oksasteik
Mánadagin 13. jan:
Kjøtbollar í karry
Týsdagin 14. jan:
Hamburgarryggur
Mikudagin 15. des:
Saltkjøt
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 20,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 28,00
Matstovan í Hoyvík

Kaggin
Hetta vikuskifti spæla
AUDIO
5'ari:
fríggjadag
leygardag
sunnudag
kl. 17.00 - 20.00
Kaggin
www.kaggin.fo

RIO BRAVO
Tlf 319767
Upplatingartíðir:
Sunnudag 18-23
Mánadag 18-23
Mikudag 18-23
Hósdag 18-23
Fríggjadag 18-24
Leygardag 18-24
Borðbílegging á tlf. 31 97 67
RIO BRAVO
Tlf 319767
Sverrisgøta • Tórshavn
Tlf 31 97 67